# Idé Møblar – eitt megastórt gávuhús





Idé Møblar á Hálsi er eitt megastórt gávuhús við hópin av gávulutum og góðum tilboðum til sínar kundar.

Fyritøkan hevur yvir 30 ár á baki og hevur húsast á núverandi adressu á Falkavegi í 10 ár. Tað var í 1979, at Idé Møblar fyrstu fer læt upp við Staravegin í sama grannalag.

Tað er ikki uttan orsøk at handilin í fleiri ár á rað varð kosin Ársins Handil. Idé Møblar er nevniliga nakað heilt serligt. Bara tað at koma inn í handilin er ein uppliving. Tað er eins og alt virkar so perfekt og avslappað samstundis. Hóast nógv fólk eru inni í handlinum, merkist tað ikki sum tað á nakran hátt er trongligt.

Millum gávuhugskotini kunnu vit nevna lampur og ljós av alskyns sløgum, kommodur, reolir, rammur til myndir og plakatir, goymslukassar, pútur, skálir, stakar, gløs og stell.

Har er alt jólaprýði sum finst – bæði til at pynta úti og inni og til jólatræið.

Idé Møblar ein professionellur handil við denti á at kundin kennir seg væl og fær góða tænastu, siga Elsebeth og Birgir Andreasen, stjórar í Idé Møblum.

---

# *Undir einum lítlum træi liggur... ein bókapakki!*

***Allarbesta jólagávan er hørð og fýrakantað og keypt í bókabúðini. Sosialurin viðmælir nýggjar føroyskar bókaútgávur í hvørjum blað í jólamánaðinum.***

## Krimi til jóladagarnar
### *Norska løva*

Jólini eru ikki verulig, fyrr enn eitt eintak um Hannis Martinsson og hansara spennandi heimi liggur undir jólatrænum.

So tíbetur sveik Jógvan Isaksen heldur ikki í ár. .

Færøernes Mellem- og Realskole er ein vakran dagin í mai 1935 á útferð í Lamba fyri at síggja og hoyra um útgrevsturin eftir Norsku Løvu, sum fór á land nýggjársaftan 1707. Á útferðini hvørvur ein fjúrtan ára gamal drongur, og 75 ár seinni biður beiggi drongin Hannis Martinsson um at hjálpa sær við at fáa greiðu á málinum. Hóast Hannis ikki hevur nógv álit á, at tað skal lukkast at finna fram til nakað so nógv ár seinni, tekur hann av. Brátt er hann fløktur inn í eina røð av ósvaraðum spurningum og deyða.




## Útvarpssendingar í jólagávu
### *Søgan um jødarnar*

Bókin byggir á útvarpssendingar hjá Sonna Smith, har hann prátaði við Hans Holm, lektara, um øll heimsins lond og fólk. Søgan um jødarnar varð endursend í 2009 og kemur nú út í bók.

"Fólk flest – eisini her á landi – eisini sokallað upplýst og modernað fólk í dag, ganga runt við einum bílæti av, hvussu ein jødi sær út. Ein jødi er myrkur, hann hevur myrkar eygnabrýr, hann hevur krókuta, yvirhøvur langa nøs. Tað, sum er tað syrgiliga við hesum bílætinum, er jú tað, at hetta er tað bílætið, sum jødahatarar máladu út fyri fólki fyri góðum hundrað árum síðani og seinni eisini." Bókabrot.




### Hesar selja best

Á heimasíðuni www.ritograk.fo stendur eitt yvirlit yvir mest seldu bøkurnar í farnu viku.
Listin sær soleiðis út:

1) Serstakar hendingar á sjónum
2) Lætt & leskiligt 3´arin
3) Í Waffen SS
4) Norska løva
5) Fiskabókin
6) Søgan um jødarnar
7) Oddvørsa buffetstjørnur
8) Góðan morgun - tað er politiið!
9) Teir reystastu dreingir í norðum
10) Tá Jesus gjørdi nekaran hvítan

*snorri@sosialurin.fo*

